**SAMBAND YNSKIST**
33 ára gamal maður ynskir samband við kvinnu í aldrinum 25 til 35 ár. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 11.04.

## Sjavs

**SJAVSKAPPING**
á Strondum sunnudagin 29. apríl kl. 18. Leikarar millum 4 tey bestu þørini fáa steyp til ognar.
Strálan

**SJAVSKAPPING**
verður í LÍF-húsinum hóskvøldið 26. apríl kl. 18.30.
LÍF

## Súkklur

**TIL SØLU**
Væl viðfarin gentusúkkla til 8-12 ár til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 316016

**SKUTARI YNSKIST**
Er nakar, sum kann selja mær ein Derbi Pretador, so ring
Tlf. 370216

**TVÆR GENTUSÚKKLUR**
Tvær DBS Combi gentusúkklur til 5-10 ár, báðar við fótbremsu aftan og hondbremsu framman, sera biliga til sølu.
Tlf. 311465, e. kl. 18

**SKUTARI TIL SØLU**
Aprilia skutari, 2 1/2 ára gamal, til sølu.
Tlf. 213226

**TIL SØLU**
»Partner« damusúkkla og »D.B.S.« dreingjasúkkla, std. uml. 8 ár, til sølu.
Tlf. 318569, e. kl. 17

**YNSKIST**
Skutari ynskist til keyps. Skal vera í góðum standi.
Tlf. 255317 & 316364

**HYGG HER!**
Ein 1 mør. gomul Suzuki Rmx50 Banacross til sølu til hægstbjóðandi. Nýprísur 20.800 kr.
Tlf. 455866, spyr eftir Heina
e. kl. 18

## Teldur

**TIL SØLU**
Joystick av merkinum Logitech Digital wingman Extreme til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 314082, e. kl. 18

**NINTENDO 64**
við 3 joystickum og 4 spølum (Super Mario - Fifa 98 - GT 64 - USA Racer) til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 375291 / 222092

**TIL SØLU**
AMD Duron 800 MHz, 64 ram, 20 GB, 15" skerm, 16 MB grafikkort, keyboard, cd-rom, mús, hátalarar, Win98 og nøkur spøl.
Tlf. 281296

**TIL SØLU**
128 SD-Ram pc-100 til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 251648

## Tónleikur

**KAWAI STOVUORGUL**
Tvey rød, pedalir og rútmubox, til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 312425

**HARMONIKA**
Svedano knappaharmonika, 5 røðir við 120 bassum, 4 og 5 kóra við tónakamari, til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 314423

## Út- & Sjónvarp

**RADIO YNSKIST**
Hevur nakar eitt Tandberg Sølvsuper 12 radio at selja mær, vinarliga ring
Tlf. 319613

**FUNAI SJÓNVARP**
við video til sølu fyri 2500 kr. Eitt Kenwood anl. til sølu fyri 2500 kr. og ein sovisofa til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 281993

**KENWOOD STEREOANLEGG**
1 ára gamalt Kenwood stereoanlegg við Dali 909 hátalarum + hálvt ára gamalt Philips 29" widescreen sjónvarp við borð og Kenwood DVD spælara.
Tlf. 226292

## Ymiskt

**FRÁ HAVNAR SVIMJIFELAG**
Eingin svimjing verður flaggdagin 25. apríl. H.S.-Meistarakappingin fyri teir yngstu svimjararnar verður mikukvøldið 2. mai kl. 18.00 í Svimjihøllini í Gundadali. Eftir hesa kapping er svimjiárið liðugt. Vit byrja aftur í august. Við svimjikvøðu
Havnar Svimjifelag

**FLOKSMENN!**
Í sambandi við dystin NSÌ-B36 sunnudagin 29/4 fer bussurin úr Gundadali kl. 14.30. Komið við og stuðlið okkara liði.
Floksmenn

**TIL SØLU**
Baðikar, vask við fóti og tvær lampettur, alt ljósablátt, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 314406

**GÓÐ TRAPPA**
til sølu fyri 4.000 kr. Er niðurtikin.
Tlf. 253443

**KOLKOMFÝRUR TIL SØLU**
Brúktur Scandia no 909-N stovuovnur, M©2. JEUN8SS8.
Tlf. 371336 - 252937

**TIL SØLU**
Linsa til teleskop til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 223282

**SJÓNLEIKURIN SEYMISTOVAN**
verður spældur á Strondum mikudagin 25. apríl kl. 20, leygardagin 28. apríl kl. 16 og sunnudagin 29. apríl kl. 16. Bólkaavsláttur verður givin. Atgongumerki kunnu bileggjast á tlf. 224591.
Stranda Sjónleikarafelag

**NOKIA 5110**
til sølu.
Tlf. 224984

**PORTUR**
Tvey hondgjørd, heilgalvaniserað, føroysk portur til sølu.
Tlf. 315503

**TIL SØLU**
Tveir dup. radiatorar, 234x54 cm, ein 200x37 cm, og ein 270x37. Hvítt hondvask, brúnt hondvask, brúnt wc og hvitt baðikar, 160x70.
Tlf. 315824

**ÁRLIGI MARKNAÐARDAGURIN Í SJÓNLEIKARHÚSINUM**
verður 5. mai. Hava tygum eitthvørt at lata okkum, taka vit ímóti 28. apríl kl. 13-17 á parkeringsøkinum eystan fyri Sjónleikarhúsið. Eisini ber til at ringja 217510, um vit skulu koma eftir lutum.
Havnar Sjónleikarfelag

**ÚTHÚS - SKÚRAR TIL SØLU/LEIGU**
Tvey úthús, heilársisolerað, vælegnað til arbeiðsskurðar, 440x360.
Tlf. 313804 ella 213804

**FJARSTÝRT FLOGFAR**
bíliga til sølu. Liðugt bygt og óbrúkt. Við fylgir fjarstýring, startari og alt annað, sum skal til fyri at fáa hann flogfarið á flog.
Tlf. 211238

**STÓRT VINDEYGAÐ**
Orsakað av broyting er plastvindeyga av slagnum Føroya Gluggi, 291x200, við termorútum bíliga til sølu. Vælegnað til havastovu.
Tlf. 448310

**TIL SØLU**
Eitt litografi av Jack Kampmann, »Kaevi« 1971, 40x48 cm í rammu, til sølu fyri bert 2.200 kr.
Tlf. 457492

**STEVNAN Á STRONDUM**
verður vikuskiftið 26. og 27. mai. Ró verður 1000 og 1500 m.
Strálan og StÍF

**ÍSMASKINA**
Ein gomul ísmaskina av slagnum Gram kann faast við at avheinta hana. P.S. Maskinan er tung.
Tlf. 311843

**HOYGGJ TIL SØLU**
Nakrar byrðar av góðum hoyggj til sølu.
Tlf. 441760

# HEILSANIR

**Góði elskaði Heri**
Hjartaliga tillukku á 12 ára degnum, alt gott í framtíðini ynskja vit tær.
**Mamma, babba og Vima**

**Halló tit øll í 2. D á Frúutrø!**
Hvar eru tit øll í dag? Nú vit hava »rundað«, skuldu vit so ikki øll møtst leygarkvøldið 12. mai og reypa um gamlar dagar?
**Ringið skjótast á tlf. 316624 ella 313029**



**Góða Katrin**
Hjartaliga tillukku. Love you! Eisini ein heilsan til Høgna, Sjúrður og Jógvan

**Góði elskaði Tórolv**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum 23. apríl. Alt tað besta í framtíðini.
**Heilsan mamma, pabba og Chris**

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum við vitjan, gávum, blómum, fjarritum og telefonsamrøðum gjørdu okkum gullbrúdleypsdagin 3. februar 2001 ógloymandi og sera hugnaligan. Sambýlinum í Kollafirði siga vit hjartaliga takk fyri døgurðaborðið. Størstu tøkkina fáa børn og svigarbørn okkara fyri alla hjálp, so vit vóru før fyri at halda dagin.

**Elin og Poul Johannis Zachariasen, Streymnes**

**Góða Katrin**
Hjartaliga tillukku við degnum í dag.
**Heilsan mamma, pápi og beiggjarnir**

**Heilsanir** 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

## Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**



# TILTØK

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Hósdagin kl. 20 heimaforbundið, havið pakka við.

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

**Rhema á Hálsi**
Hóskvøldið kl. 20 felagsbønarmøti fyri fundarrøðini hjá Aril Edvardsen á hvítusunnu. Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Hóskvøldið kl. 20 bíbliutími við Regin Olsen, bøn – Jákup 1. Mós 32, 22-32. Heimasíða okkara: www.koma.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti við Andrass Arge.
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Thomas Thomassen og Teimum 4, barnaansing verður. Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

**Ebenezer**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.

**Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti við Palla Højgaard v/fleiri. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 19 Teen Xtreme, í annaðkvøld kl. 21 ungdómsmøti.
Leygardagin frá kl. 09.30 til uml. 14.00 temadagur v/Preben Hansen, evni – temadagur um forbøn, tilmelding við kunningardiskin í Filadelfia ella á tlf. 314828, kl. 17 landsbøn. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Hóskvøldið kl. 19.30 í KFUK: Andakt og burturluting fyri KFUM.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 møti, Dánjal á Dul Jacobsen talar. Mánadagin kl. 20 bønarmøti hjá Eyðbjørg og Jóhan Hendrik.

**Filadelfia, Sundalagið**
Í dag kl. 16-17.30 Urtagarðurin – eitt trivnaðarstað fyri børn, kl. 18-19 bønarmøti.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Vón fyri framman, við hugna, Bill Justinussen luttekur við sangi og David og Julianna Beck luttaka við vitnisburði.
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 17 møti við Paula Høj, barnamøti kl. 17. Tú er vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Kirkjan við Gjógv**
Missiónsvikan við Gjógv verður frá 27. til 29. apríl.
Fríggjakvøldið kl. 20 talar Emil Olsen.
Leygarkvøldið kl. 20 talar Kjartan Stakksund.
Sunnukvøldið kl. 18 talar Niels Jacob Nielsen, innsavnan til Heimamissiónina. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Mánadag kl. 20 bønarmøti.
Hósdag kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 16.30 Alphaskeið, kl. 18 møti við Andrias Nýggjagarð.

**Kirkjan í Árnafirði**
Fríggjakvøldið kl. 20 møti við Pól Jóhannessen, Óli Poulsen syngur.
Leygarkvøldið kl. 20 møti við Gimma Olsen, Streingjakórið í KFUM & K í Klaksvík syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður í Húsmøðrafelagnum í Bøgøtu 3, fríggjakvøldið 27. kl. 20.00. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Sandoy**
Um vikuskiftið verða hesi møti í Sandoynni:
Leygardagin 28. kl. 15 útimøti í Húsavík og kl. 16 í Skálavíl. Kl. 20 møti í Ungmannafelagshúsinum Samljóð í Skopun.
Sunnudagin 29. verður møti í Samljóð kl. 11 og 15. Sangkórið í Siloa, Fuglafirði syngur og Svenning av Lofti o.o. tala. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti. Ung úr Vágunum skipa fyri. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 23. apríl:*
kl. 09.45-10.15 Fimleikur. Sonja Danielsen.
kl. 10.15-18.00 Seyma fýrkantar saman til teppir til móður Theresu felagsskapin.
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl
*Týsdagin 24. apríl:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Hugleiðingar um Havnina í 1920'unum. Annar partur Hjørdis Háberg, Marjun Nielsen lesur
*Mikudagin 25. apríl:*
**Stongt**
*Hósdagin 26. apríl:*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Teldupurát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 27. apríl:*
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Pensionistafelagið í Havn**
kemur saman hvørt mikukvøld í Losjuni, Tinghúsvegur 18. Øll M/K sum eru fylt 60 ár eru vælkomin at gerast limir.

**Losjan í Havn**
Fríggjadagin hittast tilkomin og eldri til hugna fyri seinastu ferð í vetur. Tilmeldan verður til útferðina.

**Vágs Matmøðrafelag**
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Vága Gongufelag**
Um viðrar verður farið til gongu niðan í Glyvur, norðanfyri Vatnsoyrar sunnudagin 29. kl. 14.00. Byrjað verður norðanfyri Vatnsoyrar. Havið kaffi og góð gonguklæðir við. Tilmelding hjá Ferðavinnuni í Vágum, tlf. 333455 ella 213455.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundur verður í kvøld kl. 20–21 og 22.30-23.30.

**Al-anon**
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn**
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International**
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

**Føroyskir fiskimenn**
uttanlands, tlf. 21 04 95. Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**MBF-skrivstovan**
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail: mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373

**Giktafelag Føroya**
*MBF Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 fax 310813*
*e-mail:*
*gikt@post.olivant.fo*
Opið týsdag og hósdag kl. 10-13.
Fibromyalgibólkurin: Tlf. 310237 týsdag frá kl. 10-12.
Ungdómsumboð: Sára, tlf. 373106. E-mail: sara@post.olivant.fo

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419
Skrivstovan er á niðaru hædd og er opin hesar tíðir.
Týsdag fyrrapart kl. 10.00-11.30
Hósdagin seinnapart kl. 16.00-17.30.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail:
ffk@post.olivant.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Sjómansheimið Ørkin í Reykjavík**
Møtini byrjaðu 1. oktober kl. 16 og verða hesa klokkutíð allan veturin.

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg,
tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt (donsk tíð).

**Føroyingafelagið í Odense**
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

**Føroyingafelagið við fjørðin**
**Jægerspris.** Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til
Fríði tlf. 47317438
Gudni tlf. 47387748

**Føroyingafelagið í Árhus**
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Húsið er opið mánadag til hósdag kl. 16-18 og fríggjakvøld kl. 21-03.
Føroysku bløðini liggja frammi. Kaffi er ókeypis.
Flogbóltur í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16-18. Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30.
Føroyskur barnaskúli annanhvønn leygardag (ólíka vikur) frá kl. 11-14.

**Føroyingarfelagið í Aalborg**
Lille Kongens Gade 10 B.
Tel. 98136330
E-mail:
ffaalborg@mail.tele.dk
Álaborg er opin soleiðis:
Fríggjadag: Fimmarin frá 17.00 til 19.00
Leygardag: Opið hús frá 22.00 til 03.00.
Álakórið venur hvønn sunnudag kl. 18.00.
Kortkvøld er annaðhvørt fríggjakvøld frá kl. 19.00
Føroyskur dansur er annaðhvørt hóskvøld kl. 19.30.
Annars vera tiltøk, ið verða á skránni, lýst í Túnatosi, sum kemur út einaferð um mánaðin.

## Brúdleyp

12. mai giftast Oddfinn Nilssen, Argir og Nelsi Simonsen, Sandur. Vígslan verður í heiminum kl. 15.00. Vælkomst verður í Samljóð í Skopun kl. 20.00.